# astu vikurnar




## Og stjørnan lýsti sum ein sól

OG STJØRNAN LÝSTI SUM EIN SÓL er ein jólakrubba, sum russiska listakvinnan Anastassija Archipowa hevur sniðgivið og málað.

Uttaná líkist hetta einari bók, hildin saman við reyðari silkisloyfu, og við jólaevangeliinum aftanfyri. Men letur tú hana upp, so kemur fram ein trý dimensional mynd av fjósinum við krubbini og øllum tí, ið hendi har jólanátt fyri mongum árum síðan. Har eru seyðamenninir við dýrum sínum, teir vísu menninir, Jósef og Maria við Jesusbarninum í fanginum, og uppi yvir øllum lýsir jólastjørnan.

Og stjørnan lýsti sum ein sól er skapað í heitum, kraftfullum litum, og figurarnir eru listarligir á at líta. Alt er júst, sum vit altíð hava ímyndað okkum, at fjósið í Bethlehem hevur verið.

Jólakrubban, ið er ætlað at standa frammi í jólamánaðinum, kostar 120 krónur.

## Mín jólabók 2006




Jólabókin er aftur í ár á tremur við góðum, nýskrivaðum søgum og yrkingum og spennandi hugnaligum ítrivi at gera til jóla. Teknað til søgurnar og yrkingarnar hava ung listafólk.

Bókin er sum undanfarin ár bygd upp sum kalendarabók frá 1. desember til jólaaftan, men tú kanst nýta hana sum tú vilt. Av ítrivum kunnu vit nevna prýði til jólatræið, konfekt, prýði úr fjøruni, nissur, einglar og hugnaligar lanternur.

Skrivað hava: Oddvør Johansen, Arnbjørn Ó. Dalsgarð, Halldóra Dam, Gitte Klein, Marjun Kjelnæs, Mina Reinert, Alexandur Kristiansen, Elin Mortensen, Sámal Kristian Jacobsen og Ella Smith Clementsen. Teknað hava: Kari Roarsdóttir, Janus á Húsagarði, Jóannes Lamhauge, Annika Lávík og Heiðrikur á Heygum. Fotomyndirnar hevur Ólavur Frederiksen tikið.

Mín jólabók 2006 er ein bók til alla familjuna at hugna sær við í myrku tíðini fram til jóla; er eisini væl egnað at brúka í barnagarði og skúla.

Mín jólabók 2006 er sum stór myndabók til støddar, 88 blaðsíður, prentað í litum og innbundin. Hon kostar 150 krónur.

## Fílur og vinir

**– Søgubók við klistrimerkjum og Fílur og vinir. Lita og lær**




Fílurin, ið Bókadeild Føroya Lærarafelags gevur út í hesum døgum, er ikki ljósareyður, men hevur allar ælabogans litir. David Mc Kee hevur skapað puntuta fílin, sum er ein ábending um, at tað er í lagi at vera øðrvísi.

Heftini, ið Bókadeild Føroya Lærarafelags gevur út, kunnu brúkast sum ítriv hjá børnum í allari jólastákanini, sum skjótt fer at byrja, og eisini saman við foreldrunum, sum lesa fyri barninum, samstundis sum barnið sleppur at spæla við í søguni við klistrimerkjum.

Heftini eru tvey: Fívil og vinir. Søgubók við klistrimerkjum, við søgu og litføgrum myndum og tveimum síðum við klistrimerkjum at seta á síðurnar og Fívil og vinir. Lita og lær, við tekningum av Fívli og øðrum frumskógardjórum, sum barnið kann lita. Heftini eru 18.bls. og kosta 48 krónur hvørt.

## Allen/Brooks/Wells

## Spælibarnið




Bókin til tey 0-1 ára gomlu er ein litføgur bók við útskornari pappdukku, sum hongur í einum silkibandi. Til ber at flyta dukkuna runt í bókini og seta hana inn ymsa staðni í søguni. Á henda hátt kann barnið, sum lurtar, taka lut í søguni um barnið, sum spælir úti og inni.

Bókin er prentað á hart papp, er 10 blaðsíður og kostar 75 krónur

## Mark Haddon:

## Gátuføra málið um hundin í náttini




Bókin, sum Bókadeild Føroya Lærarafelags nú gevur út, hevur vakt miklan ans, síðan hon kom út í Onglandi í 2003. Hon hevur fingið tiltikna Whitbread Book of the Year heiðurslønina og fleiri aðrar prísir.

Nakað serligt er yvir hesi bókini, lesarin gerst hugtikin av heiminum, soleiðis sum hann tekur seg út fyri høvuðspersóninum Kristoffuri.

Kristoffur er fimtan ára gamal. Hann býr í Swindon saman við pápa sínum og gongur í skúla.

Hann hevur Asperger og hevur skil fyri støddfrøði og náttúrurvísindi, men hann skilir ikki menniskju, og atburður teirra tykist honum mangan sera løgin.

Tá ið hann ein dagin finnur hundin hjá grannanum dripnan, ger hann av at fara undir at skriva eina søgu um morðgátuna. Tað, Kristoffur ikki veit, er, at hann eisini kemur at avdúka loyndarmál, sum ger, at grundarlagið, sum hann byggir sína tilveru á, fer at ridla undir honum.

Bókin er upprunaliga ætlað sum ungdómsbók, men hevur víst seg at vera líka væl egnað sum vaksnamannalesnaður. Heilt víst er hon sera umráðandi at lesa hjá fólki, ið eru um børn, sum hava Asperger, men samanumtikið verða vit øll klókari av at lesa Gátuføra málið um hundin í náttuni.

Mortan Vang hevur hegnisliga týtt bókina, sum er 246 bls., heft við klaffum og kostar 150 kr.